**Fundarfrásøgn**

| | |
|---|---|
| Heiti: | Leiðslufundur |
| Sendast til: | Sigurð í Jákupsstovu (SíJ), Jørgen Meitilberg (JM), Malan Marnersdóttir (MM) |
| Til staðar á fundinum vóru: | SíJ, JM, HPJ |
| Skrivað hevur: | JM |
| Fundartíð: | Týsdagur, 21. oktober 2014 |
| Fundarstað: | SSS |

Mál til støðutakan:

- Einki mál innkomið.

Mál til umrøðu:

- Íverksetan av lestrarráðum.

  Í viðtøkunum fyri lestrarráðini framgongur ikki, hvussu fyrsti fundurin í praksis skal skipast.

  Niðurstøða
  Dekanurin kallar inn til skipandi fund.

- Ósamsvar er millum útbúgvingarnar á Námsvísindadeildini og kunngerðina (NR. 140 FRÁ 13. NOVEMBER 2009 UM ÚTBÚGVING AV FÓLKASKÚLALÆRARUM OG NÁMSFRØÐINGUM )

  Farið er undir at umskipa fyrsta árið á lærara- og námsfrøðiútbúgvingini. Tað vísir seg at vera ringt at menna útbúgvingarnar, tí kunngerðin ásetir innihaldið í útbúgvingunum alt ov neyvt. Sjálvt innihaldið í útbúgvingunum eigur ikki at vera ásett í kunngerð, men í námsskipanum.

  Niðurstøða
  JM tekur málið upp við MMR

- Framløga og viðgerð av mannagongdini "eldrapolitikkur"

  Niðurstøða
  Áðrenn mannagongdin kann góðkennast má greiða fáast á møguligum løgfrøðiligum ivamálum í sambandi við, at Setrið fór frá at vera ein sjálvsognarstovnur til at vera ein almennur stovnur.

  JM tekur málið upp við Lønardeildina og leggur mannagongdina fram aftur.

Kunningarmál:

- Rektarin hevur kallað inn til fyrsta fundin í Akademiska ráðnum. Fundurin verður hósdagin 27. november.
- Fyrilestur við John Lennox verður á Námsvísindadeildini 28. oktober kl. 10.30.

Ymiskt:

- Uppskotið til útbúgvingarkunngerð skal leggjast fram á leiðslufundi í næstum
- Mannagongdirnar "eldrapolitikkur" og "setanarpolitikkur" vera lagdar fram á næsta leiðslufundi.